# Rumenia, Frakland og Litava vunnu

Av liðunum, sum eru í undankappingarbólki saman við Føroyum stóð Litava seg best í vinardystunum í kvøld. Litava tók á heimavølli ímóti Moldova, og gjørdist talan um ein tryggan 3-0 sigur. Robertas Poskus skeyt tey bæði fyrstu málini fyri Litava, Tomas Danilevilius staðfesti sigurin. Rumenia vann ein tepran 1-0 sigur á Lettlandi. Sigursmálið fall stutt aftaná steðgin. Nicolae Dica skeyt rumenska málið. Frakland spældi á útivølli ímóti Svøríki, og vunnu fraklendingar 3-2, aftaná javnleik 1-1 í hálvleikinum. Henke Larsson legði Svøríki á odda longu eftir 5 minuttirs spæl. Tá 19 minuttir vóru farnir javnaði Karim Benzema fyri Frakland. Í 61. og 78. minutti skoraði Sidney Govou tvey mál fyri Frakland. Stutt áðrenn leiklok minkaði Kim Källström um munin til endaliga úrslitið, 2-3 til Frakland.



# Eysturríki nær sensatiónini

Tó at talan var um venjingardyst, so var Eysturríki ávegis eini hampuliga stórari sensatión, eftir at Emanuel Pogatetz og Marc Janko skutu hvør sítt mál undan steðginum. Italia varð skelkað, men teir komu aftur í dystin, tá Gilardino mest sum beint eftir steðgin minkaði um munin. Og tá Ramazan Özcan seinni var somikið óheppin at gera sjálvmál, sluppu Italiumenn undan tí heilt stóru skommini. Men nakað nøktandi úrslit varð talan avgjørt ikki um hjá Marcello Lippi, sum nú aftur er italskur venjari. Lippi gjørdist tjóðarhetja, tá hann fyri tveimum árum síðani var venjari hjá liðnum, sum vann HM-endaspælið í Týsklandi.



*Føroyska uppspælið varð fyri tað nógva avmarkað til langar sendingar móti Rógva Jacobsen, men umgyrdur av mótstøðumonnum vóru arbeiðstreytir hansara mest sum ómøguligar*

*Mynd: Polfoto/AP*

kontraspælinum, og uttan hesar gjørdist tað serstakliga tungt hjá restini av liðnum at vinna seg fram eftir vøllinum.

Sæð í ljósinum av øllum hesum, so var tað merkisvert, at landsliðsvenjarin nýtti júst hendan dystin til at seta Jákup á Borg á beinkin. Hóast Jákup ikki hevur havt sítt besta kappingarár, so er hann millum teir mest royndu á landsliðnum, og meira enn nakað annað, so vantaði føroyska liðnum royndir á degnum. Men kanska var talan eisini um eitt signal, sum hevði til endamáls at rista Jákup eitt sindur, nú fýra undankappingardystir standa fyri framman í heyst.

Talan er tó um stutta tíð til hesar. Serbia er nummar 34 á listanum, so í so máta er uppgávan ikki heilt so møtumikil. Men fyri tað er eingin ivi um, at Jógvan Martin Olsen hevur tríggjar jólagávur á ynskislistanum. Nevnliga Jón Róa Jacobsen, Súna Olsen og Christian Lamhauge Holst. Fróði Benjaminsen kundi verið tann fjórða, men hann verður heilt víst ikki tøkur.

## FAKTA um dystin

**Portugal-Føroyar 5-0 (1-0)**
Vinardystur á Municipal stadion í Aveiro í Portugal mikudagin 20. august 2008 kl. 20.40
**Dómari:** Andriy Shandor úr Ukreina.
1-0: Martins 23.
2-0: Simao 48.
3-0: Duda 85.
4-0: Alves 89.
5-0: Nani 90.
**Portugal:** Quim - Bosingwa (Miguel, 34.), Carvalho( Alves, 54.), C. Martins (Fernandez, 55.), Simao, liðformaður (Duda, 71.), Raul Meireles (Fernando Meira, 77.),Hugo Almeida, Pepe, Antunes, Deco (Danny, 55.), Nani
**Gult kort:** Fernandez 90.
**Venjari:** Carlos Queiroz
1.Jákup MIKKELSEN, liðformaður, 57/-134, KÍ (16. René TÓRGARÐ, 1/-4, EB/Streymur) – 2. Jónas Þór NÆS, 2/0, NSÍ, 5. Egil Á BØ, 1/0, EB/Streymur, 3. Jóhan Troest DAVIDSEN, 5/0, NSÍ, 18. Leif NICLASEN, 1/0, EB/Streymur – 11. Símun SAMUELSEN, 18/1, Keflavík (9. Jákup á Borg, 53/, 79.), 4. Atli DANIELSEN, 26/0, Frem, 8. Mikkjal THOMASSEN, 9/0, EB/Streymur(15. Høgni Madsen, 2/0, ÍF, 79.), 7. Bárður OLSEN, 2/0, EB/Streymur (18. Bogi LØKIN, 1/0, NSÍ, 54.)54., 10. Christian Høgni JACOBSEN, 42/2, AB (17. Andreas Lava Olsen, 79.) – 6. Rógvi JACOBSEN, 51/10, KÍ
**Gult kort:** Egil á Bø og Bogi Løkin
**Venjari:** Jógvan Martin Olsen